UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Hovs Kommuna
Stapavegur 4
960 Hov

Tórshavn, tann 13. juni 2025
J. nr.: 23/10871-10
Viðgjørt:
Tygara skriv:

***Góðkenningarskriv***

**Nýggj byggisamtykt fyri Hovs kommunu**
Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Hovs kommuna í telduposti dagfestum 11. mai 2023 sent Umhvørvismálaráðnum uppskot til nýggja byggisamtykt fyri Hovs kommunu til góðkenningar.

Talan er bæði um nýggjar ásetingar og nýtt plankort.

Broytingin hevur ligið frammi frá 27. mars til 19. apríl 2023. Tá ið freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, 3. mai 2023, hevði kommunan móttikið eitt broytingaruppskot, sum ikki er gingið á møti.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og í skrivi dagfestum 22. september 2024 hevur nevndin m.a. viðmerkingar um, at uppskotið víkir frá standardum, ið vanliga verða nýttir til byggisamtyktir hjá kommununum, og at samsvar er ikki millum kort og tekst í byggisamtyktini.

Kommunan hevur í samráð við aðalráðið rættað byggisamtyktartekstin, soleiðis at hetta samsvarar við kortskjølini.

Sagt verður frá, at Umhvørvismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir, byggisamtyktina fyri Hovs kommunu.

Sambært § 7, stk. 1, í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir skal kommunan kunngera byggisamtyktina, beinanvegin hon er góðkend. Byggisamtyktin fær gildi, tá ið hon er kunngjørd.

Sambært § 3, stk. 1, í kunngerð nr. 122/2023 um lendisskrá skal kommunan senda Umhvørvisstovuni broyttu byggisamtyktina í seinasta lagi fýra vikur eftir, at hon er góðkend av Umhvørvismálaráðnum.

Mint verður á, at hóast Umhvørvismálaráðið nú hevur góðkent byggisamtyktina fyri Hovs kommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, sleppur kommunan ikki undan at fáa til vegar møguligar aðrar góðkenningar, sum krevjast frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt hesum góðkenningarskrivi eru rættað kortskjal og byggisamtyktartekstur við átekning frá Umhvørvismálaráðnum.

Vegna Umhvørvismálaráðið



Hilmar Høgenni